# SvF er eitt spennandi praktikkpláss



*Oddvør Klakstein dámar væl í sjónvarpinum*
*Mynd: Maria B. Hansen*

**Vit hava sett Oddvør Klakstein úr 9.b í Ósaskúlanum í Klaksvík nakrar spurningar um tað at vera í praktikk**

PRAKTIKK
*Maria B Hansen*

Oddvør er í praktikk í SvF . Hon heldur at tað er stuttligt at vera har í praktikk, og at tað er eitt upplivilsi at síggja, hvussu tey arbeiða saman, taka upp og seta alt saman.

Hon ætlar sær kanska einaferð í tíðini at verða sjónvarpsjournalist.

- Eg valdi SvF, tí eg vildi síggja hvussu tey gera alt, og síggja hvussu tey fáa alt at passa saman, sigur hon.

Hon møtir kl. 9 um morgunin, og er liðug uml kl 16.

Tey hava víst henni runt í SvF húsinum, og hon heldur tað er flott har.

Oddvør hevur verið við teimum, meðan tey tóku upp í Kvívík, og hon hevur eisini sæð meðan tey seta alt upp tá fótbóltsdystur er.

Fyrrapartin í gjár skuldi hon fara við teimum til Sørvágs.

- Hetta ljóðar spennandi, sigur hon.

# 10 føroyskar fyritøkur á Icefish framsýning í Reykjavík



*Annleyg Lamhauge frá Menningarstovuni bjóðar føroyska, íslendska og namibiska fiskimálaráðharrunum vælkomnar á føroyska básin*

Icefish fiskivinnuframsýningin í Reykjavík varð sett mikumorgunin kl. 10 av íslendska fiskimálaráðharranum Árna M Mathiesen

Í ár eru fleiri enn 500 útstillarar úr fleiri enn 35 londum sum húsast á fleiri enn 13000 fermetrar Icefish er sera væl vitja. Seinasta framsýning í 2002 setti met fyri vitjandi. Tá vóru fleiri enn 18000 vitjandi frá 52 londum.

Menningarstovan skipar aftur hesaferð fyri Føroysk-um Landabási, har einar 10 fyritøkur eru umboðarar. Umframt fyritøkurnar sum eru á básinum sum Menningarstovan skipar fyri, eru fleiri sum eru umboðar á øðrum básum hjá samstarvsfeløgum.

Nógvir føroyingar síggjast millum tey vitjandi. Flogfelagið Føroyar skipar fyri serligum leiguflogfari, sum varð fullsett í morgun og kemur heimaftur beint eftir at framsýningin letur aftur leygardagin.

## KROSSORÐ




## Vinnari:

*Bjørn Mohr Slættanes*
*Marknagilsvegur 70 B*
*100 Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: TRUMMUSLÁARI

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| T | A | N | N | D | E | I | L | I | G | A | H | A | V | N | |
| R | R | | Ó | | M | N | | N | E | M | U | S | | O | L |
| A | G | E | N | T | U | R | | | V | E | G | A | | N | A |
| P | I | O | | A | | I | H | S | | N | L | | | N | M |
| P | R | I | M | U | S | | E | O | S | | O | P | N | U | M |
| U | | | Y | | T | E | N | N | A | S | T | | Á | S | A |
| G | J | A | L | D | O | Y | R | A | | O | | S | A | K | |
| Ø | Ð | A | N | | R | | I | R | A | N | S | K | | Ú | T |
| T | | | U | R | M | A | K | A | R | I | | Ú | L | L | I |
| A | P | U | G | E | K | K | U | R | | N | Ó | G | V | I | R |
| 431 | E | | Ø | V | I | | R | | K | U | R | V | | N | R |
| S | T | | T | I | N | G | | | L | M | E | | S | | A |
| Á | R | G | A | N | G | U | R | | Æ | | I | R | A | N | |

### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

Loysunarorðið: ..........................................  **432**

Navn: ..........................................................

Bústaður: ...................................................

Bygd/býur: ..................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkur** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***